DAGSINS MEINING

Okkurt mi›víst gerast

Hóast ta› ikki ver›ur stilla› upp politiskt í øllum teimum størru bygdunum, so vísir kommunuvali› greitt, at tjó›veldislistarnir høvdu eitt gott val, me›an ta› gekk minni væl hjá Javna›arflokkinum sum heild. Men á Tvøroryi gjørdist hann aftur tann størsti flokkurin, hóast hann ikki fekk meirilutan.

Í Havn, Klaksvík, Vági og í Fuglafir›i hev›i Tjó›veldisflokkurin eitt stak gott kommunuval. Ta› tykist tí greitt, at Tjó›veldisflokkurin fær b‡rá›sformenninar í Klaksvík, Vági og Fuglafir›i. Í Havn er stø›an eitt sindur ógrei› enn, hóast vali› í høvu›ssta›num var ein álitisváttan til sitandi borgmeistaran út Tjó›veldisflokkinum.

Nú eru ta› nógv sum siga, at kommunuval hevur einki vi› landspolitikk at gera. Men ta› er bæ›i rætt og ikki. Vit hava sæ› seinastu árini, at í hvussu er b‡irnir hava størri og størri leiklut í landspolitiskum høpi. Harafturat kemur, at fleiri málsøki ver›a løgd út til kommunur at umsita. Tí fer kommunalpolitiska øki› at fevna um nøkur stór politisk mál at gera, eitt nú innan almanna- og eldraøki›. Og tá er ta› gott at hava politisk tilvitandi fólk í b‡- og bygdará›um.

Eisini eiga vit at hugsa um spurningin, um kommunur ver›a lagdar saman. Ver›ur uppskoti› at leggja saman framt í verki, hevur ta› eisini t‡dning, at politiska arbei›i› í stórkommununum er væl skipa› vi› gó›um fólkum.

Sjálvt um vit síggja vit burtur frá landspolitiska t‡dninginum, so hevur ta› eisini t‡dning fyri flokkarnar kortini, at teir stilla upp politiskt, og at teir stilla upp vi› fólkum í fremstu rø›. Tí klárar ein bygdará›sella b‡rá›sforma›ur seg væl, kann ta› eisini fáa t‡dning í landspolitiskum høpi. Hann kann fáa eina gó›a upplæring í kommunalpolitikki, sum so eisini kann ver›a landspolitikki at gagni. Ta› hava vit sæ› á›ur. Harafturat kann vi›komandi draga atkvø›ur til flokkin vi› eitt løgtingsval.

Ikki skerst burt, at bæ›i Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin høvdu eitt gott val í høvu›ssta›num og kunnu skipa eina borgarliga samgongu einsamallir. Men eitt anna› bo› er eisini, at verandi samgonga vi› Tjó›veldisflokkinum, Sambandsflokkinum og Javna›arflokkinum heldur fram. Hon hevur virka› væl og gott er at hava eina samgongu tvørtur um mi›juna. Skal henda samgonga skipast, stendur Sambandsflokkurin til at fáa borgmeistaran sum størsti flokkur. Ein annar møguleiki er so at skipa eina brei›a samgongu, sum Javna›arflokkurin hevur mælt til.

Samanumtiki› eiga javna›arfeløg ella flokkurin at umrø›a og greina vali›, og spyrja, hví ta› ikki gekst betur. Tí skal flokkurin fáa størri ávirkan í kommunalpolitikki má naka› mi›víst gerast. Ta› vísti b‡- og bygdará›svalini t‡sdagin til fulnar.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Thomas Araboo 60

Í seinastu viku fylti vágama›urin á Signabø, Thomas Arabo, seksti, Thomas Arabo hevur sett síni spor í samfelagi› virkna lívi›. Mest er hann kendur sum politikkari, sum landsst‡risma›ur og hann hevur siti› i mong ár í Tinganesi. Hann er eisini kendur sum almennur vinnulívsma›ur. Hann sat í mong ár sum stjóri fyri Strandfer›sluni og hann leg›i lunnar undir okkara nútímans farma og fer›aflutning.

Sum politikkari er Thomas Arabo kendur sum ein reellur ma›ur og hann er heldur ikki bangin av sær. Hann hevur roynst væl hjá fjølmi›lunum, skilt á tann hátt, at hann altí› hevur givi› fjølmi›lum grein bo› um vi›urskifti á hansara politiska arbei›søki.

Thomas Arabo fór sum ungur til skips, hann tók st‡rimannsprógv. Men hugurin stó› framvegis til bókina og seinni tók hann útbúgving sum verkfrø›ingur.

Tillukku vi› degnum.

je

He›in helst borgarstjóri

Nógv er sum bendir á, at He›in Mortensen ver›ur n‡ggjur borgarstjóri í Havn.

He›in Mortensen er 54 ára gamal, men kortini hevur hann siti› í Tórshavnar b‡rá› í samfull 28 ár - nógv meira enn nakar annar, sum í dag myndar lei›sluna í høvu›ssta›num. Hann var› fyrstu fer› valdur í b‡rá›i› fyri uttanflokkalistan hjá Peturi í Gong í 1972. Hann hevur veri› afturvaldur vi› øll valini sí›ani, men skifti í 1988 flokk - tá stilla›i hann upp fyri Sambandsflokkin, har hann hevur veri› valdur sí›ani. Vi› valtoppskorari, men hetta er fyrstu fer› sí›ani 1980, at sitandi borgarstjórin fær undir 1.000 atkvø›ur. Leivur Hansen fekk »bert« 528.

Í skrivandi stund ljó›ar, at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin leggja

sí›stu hond á eina samstarvsavtalu. Kortini eru gitingar um, at strí›i› um borgarstjóran ver›ur so stórt, at hendan samgongan ikki ver›ur til naka›. Tí kann roknast vi›, He›in ver›ur borgarstjóri í verandi samgongu millum Sambandsflokkin, Tjó›veldisflokkin og Javna›arflokkin.

Ta› liggur á ljó›i, at Jan Christiansen skal vera borgarstjóri í eini tílíkari samgongu, tí Fólkaflokkurin gjørdist størsti flokkur. Jan Christiansen hevur veri› b‡rá›slimur sí›ani 1984, men hann er ikki longur fyrstvaldur á Fólkaflokslistanum. Vi› sínum 309 atkvø›um enda›i hann á tri›ja plássi. Men av tí at Jákup Suni Joensen er tingma›ur og hevur egi› virki, ver›ur mett, at hann ikki ver›ur borgarstjóri. Bjarti Mohr er n‡ggjur, men hann ver›ur mettur sum borgmeistaraevni hjá Fólkaflokkinum seinni, um ta› ikki eydnast flokkinum at fáa borgarstjóran hesafer›.

He›in Mortensen var› valdur á ting fyri Sambandsflokkin í 1998. Hann er eisini kendur fyri at sita í nógvum nevndum, og hevur hann m. a. veri› forma›ur í ÍSF sí›ani 1980.

Ver›ur He›in Mortensen borgarstjóri, so fer hann helst ikki at leggja starvi› sum tingma›ur frá sær. Hann hevur fyrr sagt vi› Sosialin, at hann fegin átekur sær bæ›i starvi› sum borgarstjóri og sum tingma›ur, tí hann heldur, at hesi álitisstørv sti›a upp undir hvørt anna›.

Borgarliga starv sítt hevur He›in á Tryggingarfelagum Føroyar. Har hevur hann veri› sí›ani 1978. Hann lærdi til maskin- og bilmekanikara hjá Wenzel Petersen.

Bergur Hansen, djóralækni

Heri Joensen, prestur

Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur

Ingi Højgaard, løgfrø›ingur

Jens Andreassen, lækni

Jóhanna á Tjaldrafløtti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur

Jón Klein Olsen, politistur

Jón Kragesteen. Fer›slutrygd

Spyrji› serfrø›ingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merki›, hvørjum tit seta spurningum.

Julianna Næs, pedagogur

Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi

Turid Thomsen, lestrarveglei›ari

Marius Staksberg, málfrø›ingur

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta›
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil si›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Gle›ir seg til at sleppa í gongd

Eitt høvu›smál hjá n‡ggja b‡rá›num ver›ur at fáa meiri virksemi til Tvøroyrar, sigur Pauli Einarsson, sum nú fyrstu fer› sleppur at royna seg í kommunalpolitikki

KOMMUNUVALI›
Áki Bertholdsen

– Ta› gekk nogv betri, enn eg hev›i væntа›. So nú gle›i eg meg til at sleppa ígongd.

Pauli Einarsson á Tvøroyri sleppur nú at royna seg í kommunalpolitikki fyri fyrstu fer›.

T‡sdagin var› hann valdur í b‡rá›i› á javna›arlistanum næst aftaná Sverra Midjord, sum var› fyrst valdur.

Pauli Einarsson vil ikki enn so nógvum, hvørji b‡rá›num.

Men hann heldur tó, at ta›, sum ver›ur sett ovast á skránni, er at fáa meiri virksemi til Tvøroyrar. Og hann dylir ikki fyri, at hann hugsar fyrst og fremst um oljuvinnuna.

Tosa enn

Annars eru enn onki avgjørt um, hvør fer at skipa næstu samgonguna í B‡rá›num. Vi› sínum trimum b‡rá›slimum av sjey, hevur javna›arflokkurin tiki›stig til at skipa samgongu.

– Enn eru ongar veruligar samrá›ingar. Vit hava tosa› vi› hinar tríggjar flokkarnar og vit tosa framvegis. Mest ver›ur tó tosa› vi› teir bá›ar b‡rá›slimirnar hjá sambandsflokkinum og uttanflokkalistanum, men ongar ítøkiligar samrá›ingar eru enn.

Og enn er púra onki avgjørt um, hvør skal vera borgarstjóri á Tvørooyri teg næstu f‡ra árini, sigur Pauli Einarsson.

Sjálvur heldur hann, at ta› besta hev›i veri› at fingi› allar sjey b‡rá›slimirnar at gingi› saman um eitt samstarv.

– Eg haldi, at tá i› avtornar, eru allir flokkarnir í b‡rá›num samdir um tey allarflestu málini. Avbjó›ingin fer heldur at vera at finna, hvørji mál, flokk-arnir kunnu hugsast at blíva ósamdir um.

Hann vísir eisini á, at fíggjarstø›an hjá kommununi er so, at ta› fíggjarliga rásarrúmi› hjá b‡rá›num at gera naka›, er ógvuliga avmarka›.

Skuldin er 110 milliónir og tey næsta valskei› fer mest at snúgva seg um at betala skuldina ni›ur, og tá i› hetta er gjørt, er ikki nógv eftir at gera naka› anna› fyri, sigur Pauli Einarsson.

Pauli Einarsson, fremst á myndini, avmynda›ur inni á javna›arkaféini á Tvøroyri sjálvan valdagin. Her prátar hann vi› kendar javna›armenn á Tvøroyri. Pauli Einarsson er n‡valdur í b‡rá›i› og eitt av hansara hjartamálum ver›ur at fáa meiri virksemi til Tvøroyrar

Jólasøla á Blindastovninum

Í hesum døgunum er nógv stákan runt á hesum ymisku verkstø›unum. Nøkur verkstø› hava longu havt jólasølu og onnur fyrireika komandi vikuskiftini til sína jólasølu.

Á Føroya Blindastovni er jólah‡rurin eisini á hásæti hesar dagarnar. Á vevistovuni vera tey seinastu pløggini klipt ni›ur. Nógv vakurt er vovi› úr føroysku ullini – turrikløø› í ymiskum støddum og litum, barnateppir o.m.a. Á træverksta›num standa smáir snøggir leypar og bí›a eftir at fáa fetilin ík‡ttan, me›an roynt ver›ur at náa at flætta setur á onkran krakkin afturat. Frá leirverksta›num eru vakrar skálir o.a. Ymiskt er eisini seyma›, eitt nú bamsur til tey smærru børnini. Jólapr‡›i av ymiskum slag hevur seinastu tí›ina veri› tilevna› og hesar sí›stu tímarnar á›renn søluna, er øll orka løgd í at gera stásiligar jóladekreatiónir til sølu. Eins og undanfarnu árini ver›ur høvi at keypa sær kaffi og heitar vaflur og fáa eitt hugnaligt prát.

Vi›skiftafólkini gle›a seg, hetta er teirra dagur, har tey kunnu vísa ø›rum, hvussu hegnig tey eru – hóast sjónin sveik.

Sølan er leygardagin 25.dnov. frá kl. 14.00 til 17.00.

ÁLMANAKKIN 2001
- ein bílig og viðkomandi jólagáva -

Í samfull 73 ár hevur Álmanakkin á so mangan hátt verið álitið hjá fólki á sjógvi og landi úti sum heima. Haðani hevur tú altíð fingið svar uppá spurningar um eitt nú dagar og mánaðar, sól og mána, skip, bátar og streym.

Álmanakkin 2001 inniheldur umframt alt tað vanliga, nýteknaði streymkort, kort yvir hagapartar, oljuloyvi, alivinnuna og føroyskar havnir.

Bókin er prýdd við litum og er 320 blaðsíður. Enn sum áður er Álmanakkin ein bílig bók. Óinnbundin kostar hann einans 125 krónur, meðan innbundna útgávan kostar 175 krónur.

Streymkort, kort yvir hagapartar, oljuloyvi, alivinnuna og føroyskar havnir.

Pf. H.N. Jacobsens Bókahandil
Tel +298 31 10 36 · P.O. box 55 · FO-110 Tórshavn
e-mail: hnj-book@post.olivant.fo